# West Ham er nú selt

Íslendsku eigararnir av West Ham hava nú selt felagið. Í fyrsta umfari hevur íløgufelagið, CB-Holding keypt felagið, og tað merkir, at Bjørgolfur Gudmundsson ikki longur er formaður í felagnum. Nýggjur formaður er fyribils Andrew Berhardt, og thann hevur longu nú sagt viðhaldsfólkunum, at peningur verður tøkur til keyp av nýggjum spælarum.

# Brasilia vann í Uruguay

Brasilia og Uruguay hava saman við Argentina í 80 ár kappast um heitið sum sterkasta fótbóltstjóðin í Suðuramerika. Og tí var fagnaðurin skilliga stórur, tá Brasilia um vikuskiftið ann ikki minni enn 4-0 á útivølli móti Uruguay. Daniel Alves, Juan, Fabiano og Elano stóðu fyri málunum, og so bilti tað minni, at Fabiano seinni varð rikin av vøllinum. Brasilia er nú saman við Paraguay á odda í HM-undankappingini í Suðuramerika.

# Stóri áhugin er tvíeggjað svørð

**Tað er alneyðugt, at róðrarfeløgini taka áheitanina hjá Róðrarsambandinum um at venja startin við barnamanningunum í alstórum álvara**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fyrsti FM kappróðurin í ár er av. Luttøkan var góð. Í summum førum var kappingin tøtt, og harvið kendist tað soleiðis, at tað kanska fer at verða spennandi og tætt í FM kappingini. Í øðrum øðrum førum varð róðurin soleiðis, at tað longu nú bara tykist vera avgreiðsluspurningur, hvør fer at vinna FM.

At áhugin fyri at taka lut í barnaróðrinum vísir seg at vera so stórur, sum hann var tað á Norðoyastevnu, er sjálvsagt ógvuliga positivt. Seinnu árini hevur aftur og aftur verið tikið til, at kappróðurin hevur verið í aldudali. Kanska er hann tað framvegis, men áhugin millum tey yngstu kundi bent á, at tað er ljós fyri stavn!

Klaksvíkar Róðrarfelag hevur verið í aldudali. Luttøkan í ársins fyrsta FM róðri vísti, at klaksvíkingar eru um at koma fyri seg aftur. Umframt umborð á bátunum so høvdu tey har norðuri spent seg út við at syrgja fyri góðum karmum kring róðurin.

Seinnu árini hava feløgini gingið nógv uppí, at fyrsta skotið í FM kappingini skal hava verið latið av klokkan trý – ella kanska nøkur sekund áðrenn klokkan trý!

Á Norðoyastevnu eydnaðist tað ikki at skjóta fyrsta FM startskotið fyrrenn klokkan var farin væl av trý.

Orsøkin var ikki tann, at fyrireikararnir dumpaðu.

Heldur vóru tað trupulleikarnir við at fáa barnaróðrarnar avgreiddar, sum vóru orsøkin. Róðrarsambandið hevur ábyrgdina av sjálvum róðrinum, og boðini frá startdómarunum til feløgini eru greið:

- Tað er alneyðugt, at tað verður lagdur størri dentur á at venja startin, segði Heðin Hansen, sum var annar av startdómarunum.

Á Norðoyastevnu hevur tað altíð verið eitt sindur torførari at leggja bátarnar, enn tað hevur verið, tá ið tað hevur verið ligið longri út á róðrarárið.

Sjálvandi fer tað eisini at verða soleiðis í ár. Men tá ið umboðini hjá RSF heita á feløgini um at venja startin og tað, sum byggir upp til startin, so eiga feløgini at taka áheitanina í størsta álvara.

Tá ið klokkan fer væl av trý, áðrenn fyrsta skotið í FM kappingini ljóðar, so kennist tað ikki so hugaligt. Tey, sum fylgja við í kappróðri, vita, at tað er neyðugt at brynja seg við toli, men tað skal valdast.

Veður og vindur mugu sær sjálvum ráða. Alt tað, sum tað stendur í menniskjahondum at syrgja fyri, eigur at verða avgreitt so væl, sum tað á nakran hátt ber til. Stóra luttøkan í barnaróðrinum boðar frá hugaligari gongd. At trupulleikar við at fáa barnaróðrarnar avgreiddar skal verða orsøk til, at samlaða róðrartíðin verður órímuliga long, kann fara at vísa seg at verða tvíeggjað svørð.

Tí eru hyggjuráðini hjá teimum, sum við at venja børnini vísa stóran áhuga, at tey læra tey at leggja til startboyurnar og harvið verða við til at laga tað soleiðis, at tað fer at ganga uppaftur lagaligari fyri seg, enn tað gjørdi á Norðoyastevnu.

# Miðvingar halda stílin



*Riddarin legði soleiðis fyri í hesum róðrarárinum, at alt bendir á, at hann ætlar sær at halda stílin, sum hann fann á Eystanstevnu í fjør, og sum hann hevur hildið síðani tá.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tvørabáturin er aftur í ár millum teir bestu, men tað verður tungt tak hjá suðringum at vinna seg fram til fyrsta sigurin sigurin síðani á Sundalagsstevnu fyri tveimum árum síðani**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað var á Eystanstevnu í fjør, at miðvingar umborð á Riddaranum undirstrikaðu, at teir høvdu ætlanir um at vera við í FM kappingini.

Á Norðoyastevnu fyri einum ári síðani eydnaðist tað ikki so væl hjá miðvingum. Teir endaðu á triðja plássi, og tá ið tað á Sundalagsstevnu endaði við fjórða plássi og við triðja plássi á Jóansøku varð ikki roknað við miðvingum.

Men síðani á Eystanstevnu í fjør hevur tað ikki verið nakar ivi. Riddarin vann á Skálafjørðinum og fýra tær seinastu FM kappingarnar í fjør og harvið meistaraheitið.

Á Norðoyastevnu leygardagin var heldur eingin ivi. Beinanvegin var Riddarin millum teir fremstu, og tøkini hjá vágamonnum munaðu alla tíðina meiri, enn tey gjørdu hjá øllum hinum.

Tá ið málið var hálvrógvið, var Riddarin leysur av hinum bátunum, og síðani var eingin spenningur.

Næstfremsta plássið vann Tvørabáturin. Suðringarnir hava verið drúgvir at taka lut, teir hava eisini sett dám á kappingina um heiðursmerkini, og tað kann ikki sigast annað, enn at Tvørabáturin hevur hildið pláss. Í fjør var hann næstfremstur í trimum teimum fyrstu róðrunum, og í hinum fýra róðrunum var Tvørabáturin nummar trý.

Leygardagin fóru suðringarnir – á sama hátt sum á Norðoyastevnu í fjør - suður við silvurmerkjunum. Teir bíða framvegis eftir fyrsta sigrinum síðani á Sundalagsstevnuni fyri tveimum árum síðani. Møguleikin er sjálvandi væl og virðiliga til staðar, men avrikið hjá Riddaranum í Klaksvík undirstrikaði, at miðvingar ætla sær ikki at geva fremsta plássið frá sær uttan víðari.

# Argir best í høvuðsstaðnum

**Argjabáturin er komin út skugganum, og einki bendir á, at teir umborð á Argjum skulu fáa serliga kapping um FM heitið**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*




*Spenningurin var eingin í áttamannafarsróðrinum, har Argjabáturin frá byrjan til enda var í soloútbroti*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Átta ferðir hevur 8-mannafarið borið FM heitið út um ánna. Men síðani 2004 hevur luturin hjá Argjabátinum verið í skugganum av øðrum úrmælingum. Trúfastir hava argjamenn luttikið, men Heiðabáturin, Knørrur og Nevið Reyða hava verið meistarar.

Tað eru framvegis seks FM kappingar og harvið 42 stig eftir at rógva um, áðrenn FM steypini fara at verða handaði ólavsøkuaftan. Men kortini skal tað meiri enn vanligt hugflog til at ímynda sær, at tað skal bera til at finna annan meistara enn Argjabátin.

Um gongdin og úrslitið á Norðoyastevnu skal nýtast sum barometur, so skal tað vera heilt undarligt, um FM heitið ikki fer at verða vunnið uppaftur meiri sannførandi, enn tað var fyri fimm árum síðani.

Ta ferðina vann Argjabáturin seks tær fyrstu kappingarnar, men á Ólavsøku vann Kvívíkingur.

Á Norðoyastevnu luttóku tríggir bátar. Talan var um høvuðsstaðaruppgerð: Argja Róðrarfelag, Havnar Róðrarfelag og Róðrarfelagið Knørrur.

Talan var ikki um kapprógving soleiðis at skilja, at bátarnir kappaðust ímóti hvørjum øðrum. Heldur var tað soleiðis, at Argjabáturin kappaðist ímóti sær sjálvum.

Argjabáturin kann gerast besti báturin av øllum í ár. At vinna tann heiðurin er avbjóðing í sær sjálvum. Undir øllum umstøðum ber illa til at ímynda sær, at Argjabáturin skal fáa aðra kapping enn hana, sum teir umborð sjálvir hava hugflog at leita upp.